LM-030/2025

Sólgerð Hjørleifsdóttir FYLGISKJAL 7

Fra: Bárður Atlason Ísheim <bardur@megd.fo>
Sendt: 4. september 2025 15:16
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Emne: SV: Hoyringarskriv - Afturrindan til smærri vinnurekandi fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, sum hava verið óarbeiðsførir vegna sjúku longur enn 4 vikur
Vedhæftede filer: Hoyringarskriv frá MEGD - Afturrindan til smærri vinnurekandi.pdf

Til Almannamálaráðið,

Halt mær til góðar at fyrra skjalið riggaði ikki at opna, sí viðheft.

Vh. Bárður

Fra: Bárður Atlason Ísheim
Sendt: 4. september 2025 15:12
Til: Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>
Cc: Ruth Thomsen <Ruth@megd.fo>; Dánjal Højgaard <danjal@megd.fo>
Emne: Hoyringarskriv - Afturrindan til smærri vinnurekandi fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, sum hava verið óarbeiðsførir vegna sjúku longur enn 4 vikur

Til Almannamálaráðið,

Sí viðheft hoyringarskriv.

Vinarliga
Bárður Atlason Ísheim
Aðalskrivari

MEGD
Íslandsvegur 10C
FO-100 Tórshavn
bardur@megd.fo
Tlf. +298 527373
www.megd.fo

FYRIVARNI:
Innihaldið í hesum telduposti er ætlað omanfyri nevnda móttakara, og kann innihalda upplýsingar veittar í trúnaði. Um tygum ikki eru rætti móttakarin, gera vit vart við, at tað ikki er loyvt at avdúka, margfalda, spjaða ella á annan hátt at nýta innihaldið. Um tygum, orsakað av mistaki, hava móttikið henda teldupost, hóast hann ikki er ætlaður tygum, setið tygum vinarliga í samband við meg gjøgnum telefon ella við telduposti skjótast gjørligt. Hesin teldupostur myndar ikki nakað tilboð ella játtan av nakrari sáttmálabundnari avtalu. Slík tilboð ella játtanir mugu fráboðast í brævi ella øðrum skrivi.

CONFIDENTIALITY NOTICE:
The information contained in this email is intended for the named recipient only as the contents may be confidential. If you are not the intended recipient, we must inform you that you are not permitted to reveal, copy, distribute or otherwise use the contents. If you have received this email by mistake although it is not meant for you, please contact me by telephone or by email as soon as possible. This email does not represent any offer or acceptance of any contractual agreement. Notification of any such offer or acceptance must be given by letter or in other written format.

LM-030/2025

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 04.09.2025
Ummælistíð:
J. nr. (MEGD): 701-5-2025
J. nr. (AMMR): Ikki upplýst

Hoyringarskriv

til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (Afturrindan til smærri vinnurekandi fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, sum hava verið óarbeiðsførir vegna sjúku longur enn 4 vikur)

MEGD takkar fyri møguleikan at senda hoyringarskriv um nevnda uppskot. Mælt verður til, at øll uppskot verða send beinleiðis til MEGD á megd@megd.fo, her undir uppskot, ið viðvíkja breki, sjúku ella líknandi.

1. Endamálið við uppskotinum er at fyribyrgja at smærri vinnurekandi koma í figgjarligt óføri, tí ein starvsmaður í fyritøkuni verður langttíðar skjúkrameldaður. Hetta hongur saman við, at starvsmenn (funktionerar) hava rætt til løn undir sjúku og eru sostatt ein nógv størri figgjarlig byrða fyri arbeiðsgevaran enn aðrir løntakarar - sum ikki eru starvsmenn ella hava líkandi lønarrættindi eftir sáttmála - og sum kunnu fara undir dagpeningaskipanina, sum tað almenna betalir.

Tað er tískil positivt, at stig nú verða tikin til eina lutvísa refusiónsskipan, sum skal koma smáu privatu arbeiðsgevarunum til góða, og sum hivegin eisini skuldi komið løntakaranum til góðar, við tað at inciatmetið hjá smáum arbeiðsgevarunum at siga starvsfólk upp vegna langtíðarsjúku (stórar og tyngjandi lønarútreislur undir sjúku) við hesum gerst minni.

Fyri fólk við breki ella varandi sjúku, sum eru serliga útsett fyri langtíðarsjúku og forfalli er hetta tí sum útgangspunkt positivt.

Hinvegin tykist uppskotið alt ov avmarkað fyri at gera veruligan mun á arbeiðsmarknaðinum.

2. Skipanin, sum nú skal innførast minnir um refusiónsskipanina í Danmark, har arbeiðsgevarar - almennir sum privatir - fáa endurgoldið tað, ið svarar til dagpeningasatsin hjá viðkomandi, um fólk eru sjúk í meira enn 4 vikur.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Í hesum føri er skipanin tó avmarkað til smáar fyritøkur við lønarútreiðslum upp til 4 mió. kr, meðan tey størru arbeiðsplássini - sum hava allarflestu staarvsmenn í starvi - framhaldandi skulu bera útreiðlurnar av løn undir sjúku *einsamøll.*

Fyri fólk við breki er hetta uppskotið tí bara næstbest, og hevði tað rættasta sjálvsagt verið, at stavsmannaskipanin og dagpeninaskipanin vóru bundar saman *sum heild*, soleiðis at **allir** arbeiðsgevarar, ið hava skyldu at rinda fólk løn undir sjúku fáa møguleika fyri refusjón. Hetta so, at insitamentið til uppsøgn vegna sjúku *minkaði yvirhøvur*, tá ið talan er um uppsøgn av fólki, við rætti til løn undir sjúku. Hetta hevði økt um verjuna hjá fólki við breki og sjúku móti uppsøgn vegna sjúku, har hetta uppskotið bert kemur einum avmarkaðum skarða av løntakarum til góða.

3. Spurnartekn kann eisini setast við um refusiónsupphæddin ikki er *alt ov lítil* til, at hon kann gera nakan veruligan mun hjá arbeiðsgaverunum. Endurgjaldið tekur ikki við fyrr enn eftir 4 vikur (arbeiðsgevaraperioda sum í DK), og síðani fær arbeiðsgevarin bert endurrindað 80 prosent av eini arbeiðsmannaløn (hansara sjúkradagpengasats). Er talan um høgtløntan funktioner við høgum lønaraldri verður talan bert vera um eitt sera avmarkað endurgjald til arbeiðsgevaran, og tískil verður tað í hesum støðum *framhaldandi* eitt insitament til at siga fólk úr starvi vegna stórar útreiðslur til fólk undir sjúku og t.d. setan av sjúkraavloysara. Best er tí, at arbeiðsgevaraperiodan verður stytt og at afturberingin verður størri, um hetta veruliga skal koma teimum útsettu løntakarunum til góða.

4. Hetta uppskotið er einans vent móti *privatum arbeiðsgevarum - ikki almennum arbeiðsgevarum.* Tað vil siga, at eitt lítið arbeiðspláss undir landi ella kommunu, sum hevur minni enn 4 mió í árligum lønarútreiðslum (kanska uml. 8-10 funktionerstørv), fær ikki ágóðan av uppskotinum. Hetta arbeiðsplássið kann tó á sama hátt sum tað privata koma í fíggjarligt óføri av langtíðarsjúkum funktionerum og hetta arbeiðsplássið fer *framhaldandi* at hava eitt størri insitament til at siga fólk úr starvi enn arbeiðsplássini, har fólk kunnu fara í tað dagpeningaskipanina og abeiðsgevarin sleppur undar lønarútreiðslunum.

Hugsandi er tí at t.d. fleiri smærri kommunur, sum ofta hava funktionerar (ella fólk við tilsvarandi rætti til løn undir sjúku) í starvi, fara at hava eitt stórt insitament til at siga fólk úr starvi vegna langtíðarsjúkui.

5. Tað tykist ikki heilt gjørgnumhugsað ella konsekvent, tá ið tosað verður um at skipanin er ætlað privatum arbeiðsgevarum, ið hava starvsmenn í arbeiði. Tað tykist sum, at uppskotið einans vendir sær til tað, vit kalla *starvsmenn eftir lógini*, t.v.s. teir, sum uppfylla krøvini í starvsmannalógini. Tað tó hugsandi, at tað eru onnur, sum hava tilsvarandi rættindi til løn undir sjúku: sokallaðir *sáttmálagjørdir starvsmenn.* Tað eru fólk, sum ikki uppfylla lógarkravi, men við avtalu - individuellari ella

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

kollektivum sáttmála - hava fingið status sum starvsmenn. Eru hesi seinnu eisini fevndir?

Tað tykist í øllum førum órímiligt og ókonsekvent, um arbeiðsgevararnir bert skal hava rætt til refusjón fyri **summar** starvsmenn við rætti til løn, meðan aðrir, sum eisin hava rætt til løn undir sjúku - og tí eru eins dýrir fyri arbeiðsgevaran - ikki skulu koma undir skipanina.

Hetta eigur at vera útgreinað og kannað nærri.

6. Hóast uppskotið primert er eitt vinnupolitisk átak, framgongur tó av uppskotinum, at tað eisini hevur positivar avleiðingar fyri langtíðarsjúkir starvsmenn, sum "sannlíkt fáa eitt sterkari tilknýti til arbeiðsmarknaðin" við tað arbeiðsgevararnir við refusjónini "ikki á sama hátt eru trýstir til at siga starvsmenn úr starvi, tá ið teir gerast langtíðarsjúkir", sbr. 2.6 í uppskotinum.

Um uppskotið skal geva løntakarunum - m.a. fólki við breki - betri trygd í setanini er treytin tó, at arbeiðsgevaranir ikki uttan fyrilit nýta møguleikan at siga starvsmonnumr upp við 1 mánaða freist, t.v.s. eftir 120-daga regluni í § 5, stk. 2 í starvsmannalógini, tá ið stavsmaðurin hevur verið sjúkur samanlagt 120 dagar seinasta árið. So er líka vítt sum sýtt.

Her eigur at verða mint á, at uppsøgn eftir 120-daga regluni kann dømd ógildug eftir løgtingslógini um mismun á arbeiðsmarknaðinum vegna brek, um arbeiðsgevarin sigur fólk við breki úr starvi, uttan fyrst at hava kannað møguleikarnar og framt møguligar rímiligar tillagingar í teirra arbeiði.

7. Nøkur fólk við breki ella varandi sjúku, kunnu vænta - hóast tey eru før fyri at arbeiða púra vanligt og á jøvnum føti við onnur í longri tíð - at verða noydd at verða burturstødd í styttri tíðarskeið, enn 4 vikur, orsaka av breki ella sjúku. Tað hevði verið ein fyrimunur fyri bæði fyritøkur og fólk við breki og varandi sjúku, um uppskotið verður tillagað, soleiðis at fyritøkur hava rætt til at fáa afturrindað fyri lønarútreiðslur sum standast í sambandi við at fólk við breki ella varðandi sjúku eru burturstødd styttri enn 4 vikur, tá orsøkin er brek ella varandi sjúka.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo